LM-099/2023

**Annika Petersen**

Fylgiskjal 59

**Fra:** Fnu <fnu@fnu.fo>
**Sendt:** 23. februar 2024 12:31
**Til:** Oyvindur av Skarði
**Cc:** VMR-Journal; Joanna Djurhuus
**Emne:** Re: SV: SV: Viðvíkjandi lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar

Til Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Hervið verður sent hoyringssvar um lógaruppskot um burðardygga ferðavinnu frá FNU

FNU takkar fyri høvi at koma við hoyringssvari til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu.

Fyrst skulu vit siga, at FNU heldur, at tað er gott, at ætlanin við lógini er at verja náttúruna. Men vit sakna útgreiningar um, hvussu hetta skal fremjast í verki.

**Beriføri**
FNU mælir til at hugtakið "beriføri" verður innført. Øll øki hava eitt ávíst "beriføri", ein og hvør gøta, fjall, strond, vátlendi ella fuglaberg hava eitt ávíst beriføri – "carrying capacity".
Tvs, har er eitt loft á, hvat eitt øki tolir av vitjanum, og tað ræður um at finna tað loftið.

Tí eiga vit fyri hvørt øki sær áseta, hvussu nógvar vitjanir kunnu vera á einum staði. T.d. hvussu nógv fólk sleppa út í Mykines í senn ella hvussu nógv sleppa uppá Slættaratind o.s.fr.
Hetta kann vera gjørt í mun til sesong, men eisini at eitt dagligt ella vikuligt mark verður sett fyri hvussu nógv fólk sleppa ymsu støðini.

Skipað skal verða fyri einari áhaldandi eygleiðing av náttúrulendinum. Um t.d. skrásett verður, at eitt ternuból er á einum árendum staði, skal verða møguligt at avmarka ella steingja øki í tíðarskeiðinum meðan reiðring og bøling fer fram. Eisini skal tað kannast í jøvnum millum bilum hvussu slitið av t.d. nógvar gongu ávirkar náttúruna, soleiðis at tað er møguligt at endurbøta slitið so við og við.

Ikki fyrrenn hvørt øki hevur eina umsitingar- ella skilhaldsætlan, har beriførið verður lýst og allýst, byrja vit at nærkast einari burðadyggari ferðavinnu.

Spurningurin er so, um einstøku kommunurnar ella tey sum sita við jørðini kunnu standa fyri hesum, soleiðis at vit fáa eina homogena skipan fyri alt landið.

**Javnbjóðis rætt til náttúruna**
Uttan mun til hvørja skipan, sum farið verður undir, so heldur FNU, at allir borgarar skulu hava javnbjóðis møguleika at koma út í náttúruna at vitja náttúruvøkur støð. Hetta hevur stóran týdning fyri okkara sjálvsfatan og okkara fatan samband við náttúruna, sum vit jú øll hava ábyrgd av. Men øll atgongd skal sjálvandi skipast í mun til "beriføri" og aðrar orsøkir, so sum fjallgongu, haruskjóting o.a.

**"Náttúrugjaldið"**
FNU heldur, at í mun til burðardygga ferðavinnu, so er vandi fyri, at ætlaða náttúrugjaldið, sum útlendingar skulu gjalda, kann gerst eitt slag av "grønvasking". Fólk kunnu av hesum fáa ta fatan, at tað at rinda eitt náttúrurgjald við innkomu til landið gevur rætt til óavmarkaða atkomu allastaðni. Í hesum sambandi seta vit eisini spurning við, um gjaldið sett nóg høgt.

Harafturat FNU mælir til, at tað verður meira ítøkiliga lýst, hvat náttúrugjaldið skal nýtast til, m.a. at kommunurnar, tá ið tær taka avgerðir um hetta mál, skulu verða álagdar at gera hetta útfrá einum sterkum vitanargrundarlagi. Her verður m.a. sipað til náttúruserfrøðina hjá Tjóðsavninum og Umhvørvisstovuni. Avgerðir, sum ikki eru grundaðar á náttúruvitan kunnu gera størri skaða enn gagn. Her er umráðandi at fáa fram, at har vit ikki hava nóg góða vitan, mugu vit gera alt fyri at byggja hesa vitan upp.

Vegna FNU
Jón Kragesteen, formaður

LM-099/2023

Viðvíkjandi skipanum í mun til beriføri skal verða víst til grein viðvíkjandi Svalbard:

https://polarjournal.ch/en/2024/02/14/environment-over-tourism-on-svalbard-new-rules-from-january-2025/?fbclid=IwAR0XoSaTPeb1AeoZ7Hnl0XSPhQNUQYpLBOCMzUCqF5V7wtJfxunrCd83uH0

From: Oyvindur av Skarði (oyvindur@uvmr.fo)
Date: 01/30/24 14:21
To: Fnu (fnu@fnu.fo)
Cc: VMR-Journal (uvmr-journal@uvmr.fo), Joanna Djurhuus (JoannaD@uvmr.fo)
Subject: SV: SV: Viðvíkjandi lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar

Hey Jón

Alt í lagi. So seta vit ikki nakran fund á skrá nú.

Tit eru vælkomin at venda aftur, um okkurt er sum tit vilja umrøða áðrenn hoyringsfreistin er farin.

Vinaliga

Oyvindur

**Fra:** Fnu <fnu@fnu.fo>
**Sendt:** týsdagur, 30. januar 2024 13:55
**Til:** Oyvindur av Skarði <oyvindur@uvmr.fo>
**Cc:** VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Joanna Djurhuus <JoannaD@uvmr.fo>
**Emne:** Re: SV: Viðvíkjandi lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar

Hey Oyvindur

Takk fyri svarið. Vit fara so væl tað ber okkum til at seta okkum í málið og útfrá tí koma við møguligum viðmerkingum. Eg kann í løtuni ikki svara, um tað ber til okkum 5. februar, helst ov stutt freist, hugsi eg.

Vinarliga Jón

----- Original Message -----

From: Oyvindur av Skarði (oyvindur@uvmr.fo)

Date: 01/30/24 13:47

To: fnu@fnu.fo (fnu@fnu.fo)

Cc: VMR-Journal (uvmr-journal@uvmr.fo), Joanna Djurhuus (JoannaD@uvmr.fo)

Subject: SV: Viðvíkjandi lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar

Til FNU

Góði Jón

Uppskotið til lóg um burðadygga ferðavinnu er viðfest, og vit seta FNU á listan við pørtum sum hava fingið uppskotið til hoyringar.

Hoyringsfreistin er 22. februar kl. 15.

Um tit vilja umrøða málið við okkum, eru tit vælkomin á fund.

Sum tað sær út beint nú, ber tað til 5. februar kl. 14.

Vinaligа

Oyvindur av Skarði

Fulltrúi

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tel. + 298 55 60 82

oyvindur@uvmr.fo www.uvmr.fo

**Fra:** Annika Petersen <AnnikaP@uvmr.fo>**På vegne af** VMR-Journal
**Sendt:** mánadagur, 29. januar 2024 18:22
**Til:** Joanna Djurhuus <JoannaD@uvmr.fo>; Oyvindur av Skarði <oyvindur@uvmr.fo>
**Emne:** VS: Viðvíkjandi lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar

**Fra:** Fnu <fnu@fnu.fo>
**Sendt:** 29. januar 2024 14:59
**Til:** VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>
**Emne:** Viðvíkjandi lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar

Til Uttanríkis- og vinnumálaráðið

LM-099/2023

Í síðstu viku varð lóg um burðardygga ferðavinnu send til hoyringar.

Hervið vilja vit mæla til, at FNU Føroya Náttúru og Umhvørvisfelag verður ein av hoyringspørtunum

Vegna FNU

Jón Kragesteen